# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Vit mugu fáa nýval sum skjótast, tí Italia tørvar eina stjórn, sum kann arbeiða og byrja beinanvegin*
*(Silvio Berlusconi)*

# Nú er McCain besta boðið




*- Nú kunnu vit vinna alt, segði John McCain í takkarrøðu síni í morgun*

*(Mynd: Polfoto)*

**FAKTA**

Føddur: 29. august 1936
1958: Útbúgvin á herflotaskúlanum. Síðani flogskipari í herflotanum
1967: Skotin niður við flogfari sínum í Vietnamkrígnum og tikin til fanga
1973: Latin leysur og sendur aftur til USA
1982: Valdur í Umboðsmannatingið fyri republikanararnar
1986: Valdur í Senatið

**Fyrrverandi krígsfangin John McCain er nú besta boðið upp á forsetavalevnið hjá republikanarunum í heyst**

– Nú kunnu vit vinna tað, sum eftir er, segði John McCain í takkatrøðu síni í nátt, tá tað var greitt, at hann hevði vunnið uppstillingarvalið hjá republikanarunum í Florida.

McCain fekk 36 prosent av atkvøðunum, og næstur honum var Mitt Romni við 31 prosentum. Tann stóri taparin var fyrrverandi New York-borgarstjórin Rudy Giuliani. Hann hevði sett sær fyri at byrja sítt uppstillingarstríð við at vinna í Florida, men endaði væl aftan fyri hinar báðar floksfelagarnar. Eygleiðarar vænta, at hann fer at taka seg burtur úr kappinginni nú.

Demokratarnir høvdu eisini uppstillingarval í Florida í gjár, men úrslitið taldi ikki við, tí demokratiski flokkurin hevur boykottað Florida, tí staturin framskundaði uppstillingarvalið. Hillary Clinton var tað einasta demokratiska valevnið, sum var í Florida, og hon vann eisini við 50 prosentum av atkvøðunum. Barrack Obama fekk 30 prosent. Politiskir eygleiðarar í USA siga, at hóast sigurin hjá Hillary Clinton ikki telur við, var hann ivaleyst ein moralskur stuðul aftan á ósigurin í South Carolina.

### McCain á odda

Fyri John McCain hevði sigurin í Florida harafturímóti sera stóran týdning. Hann hevur alla tíðina verið mettur sum tað stóra spurnartekinið, tí í ymsum viðurskiftum hevur hann eina aðra meining enn republikanski flokkurin. Men aftan á valið í Florida má hann metast sum tað av teimum republikonsku valevnunum, sum hevur teir bestu møguleikarnar.

Florida er tann størsti og samstundis tann mest fjølbroytti staturin, sum hevur havt uppstillingarval higartil, og við sigrinum har hevur John McCain sett seg á odda undan tí stóra valdegnum týsdagin í næstu viku.

# Hugdu ikki upp á hvør annan



*Myndin úr Kongressini sigur meiri enn mong orð*
*(Mynd: Polfoto)*

**Fyrrakvøldið vóru Hillary Clinton og Barrack Obama í Kongressini, men tey hugdu ikki upp á hvør annan**

Hillary Clintion og Barrack Obama vóru í Kongressini fyrrakvøldið, tá George W. Bush, forseti, helt sína seinastu røðu um støðu tjóðarinnar.

Men tað var týðiligt, at tey bæði sita ikki væl um sátt.

Nakrar tímar frammanundan hevði tann kendi senatorurin Edward Kennedy boðað frá, at hann styðjar Barrack Obama í valstríðnum, og teir báðir sótu eisini lið um lið í Kongressini. Tá Hillary Clinton kom fram við teimum, rætti Edward Kennedy henni hondina og heilsaði, men Obama vendi sær burtur.

## STUTT SAGT

### Tollari tikin av døgum

Ein embætismaður í iranska tollverkinum varð avrættaður í gjár, eftir at rætturin hevði dømt hann sekan í sviki. Ein talsmaður hjá ákæruvaldinum segði, at tollarin og tríggir av starvsfeløgum hansara vóru dømdir til deyða, men at trý av málunum bíða eftir endaligari støðutakan. Sambærttalsmanninum høvdu teir fýra tollararnir tikið ímóti meiri enn fimm milliónum krónum í ólógligum samsýningum. Júst mutur er eitt sera álvarssamt lógarbrot í Iran og fær ofta harða revsing. Herfyri fingu tríggir embætismenn í einum gassfelagi tíggju ára fongsul og 74 koyrlasløg í part fyri svik.

### Leiðslan visti alt

Tann 31 ára gamli franski bankamaðurin Jérome Kerviel hevur greitt løgregluni í París frá, at leiðslan í bankanum Société General visti, at hann fekst við ymiskt, sum var uttan fyri hansara heimildir. Jérome Kerviel hevur sambært Société General snýtt bankan fyri fyri meiri enn 30 mia. krónur, men nú er komið fram, at bankin bleiv ávaraður um virksemi hansara seinasta heyst. Tað vóru ivaleyst hesar avdúkingarnar, sum gjørdu, at Jérome Kerviel varð latin leysur úr varðhaldinum í París fyrrakvøldið.

### Stutt og strævið lív

Egyptiskir fornfrøðingar, sum eru í ferð við at kanna fornaldarbýin Amarna, hava funnið beinagrindir av fleiri av monnunum, sum bygdu býin fyri umleið 3.500 árum síðani. Við at kanna beinagrindirnar eru serfrøðingar komnir til ta niðurstøðu, at menn tá á døgum høvdu eitt strævið arbeiðslív, at teir fingu í minna lagi at eta, og at teir livdu stutt. Sambært jarðfrøðingunum tók tað 15 ár at byggja Amarna, og ta fyrstu tíðina búðu 50.000 fólk í býnum.